

*Jackie hevur laðað gjøgnum mong ár, og hetta dugir hann sum fáur. Nú er skjøtil settur á garðin við summarhúsini, hann eigur uttanfyri Ålborg. Í dag gistast Jackie og unnusta hansara, Elisabeth, í ráðhúsinum í Ålborg*

# Vit vita slett ikki, hvør kemur, men vit vænta nøkur vinfólk og kenningar

JACKIE JOENSEN

rættiliga. Hetta krevur í hvussu er, at tú hongur í tær løturnar, tú ert her niðri. Eg vænti tó, at arbeiðið verður komið nokkso væl áleiðis, áðrenn summarið er lokið, leggur hann aftrat.

Spurdur, hvussu tað er at laða niður yvir bleyta undirlendið, sum er í Danmark, vísir hann á, at hann fer at leggja nakrar jarnstengur niður í betong, og síðan verður garður laðaður omanyvir.

– Hetta kemur nokk at halda, leggur hann aftrat.

Innan fyri grótgarðin, sum ikki verður serliga høgur, ætlar Jackie at hava onkrar vanligar flísar.

– Eg fái stóra hjálp frá unnustuni hjá mær – og mínari komandi konu. Hon er ógvuliga kreativ og hevur stóran áhuga fyri hesum, sum vit nú í felag eru farin undir, sigur hann.

## Giftast í dag

Meðan vit vitja Jackie og Elisabeth, fáa vit eisini at vita, at tey bæði skulu giftast í ráðhúsinum í Ålborg í dag, fríggjadagin.

– Jú, vit skulu giftast, og eg haldi, at hetta er ein spennandi tíð, sum liggur fyri framman hjá okkum báðum, sigur Jackie – og Elisabeth nikkar brosandi.

Tá vit spyrja, hvar brúdleypið skal haldast, er Elisabeth skjót at svara:

– Tað verður her hjá okkum – í okkara paradísi, sum hon tekur til.

Jackie sigur, at tey duga slett ikki at meta um, hvussu nógv fólk koma í brúdleyp.

– Nei, vit vita slett ikki, hvør kemur, men vit vænta nøkur vinfólk og kenningar. Best er, um greinin ikki fer í blaðið, fyrr enn á brúdleypsdegnum ella seinni, tí her er ikki so nógv pláss, leggur hann brosandi aftrat.

Úr túninum hjá Jackie og Elisabeth fara vit innar og sessast í summarhúsinum. Her fáa vit gott kaffi, køkur og ymiskt søtmeti.

Tey vísa okkum runt í húsinum, og meðan vit ganga um rúmini, vísir Elisabeth okkum eisini vakra brúðarkjólan, sum hon skal giftast í, brúðarbukettina, sum hon sjálv hevur gjørt – og vakurt borðprýði, har ljós er sett oman yvir lítla plátu úr gróti við pynti.

– Vit eru bæði sera spent, og vit gleða okkum nógv til stóra dagin, sigur Elisabeth Seyer.

Jackie sigur, at hann fer at fáa sær eftirnavnið Seyer, tá tey eru vorðin hjún.

## Fantastiskir grannar

Jackie vendir aftur til góða grannalagið, sum hevur verið heilt aftur til tíðina, tá foreldur hansara áttu summarhúsini.

– Jú, grannalagið er sera gott. Tá grasplenan skal sláast og haldast, og hyggjast skal eftir húsunum, hava grannarnir altíð verið fantastiskir at hjálpt okkum. Hevur nakað verið á vási, hava vit frætt um telduna – ella tey ringja. Hetta hevur als ikki verið nakar trupulleiki, og tað eru vit ógvuliga fegin um og takksom fyri.

Tað er loyvt at búgva alt árið í summarhúsunum, sum Jackie og Hans eiga uttanfyri Ålborg.

– Hetta er summarhúsøkið, men fólk kunnu búgva her alt árið. Tað eru fleiri pensjónistar, sum búgva her, og tað er okkurt við tí, at hevur tú átt húsini í eini sjey ár, kanst tú eisini búgva í teimum alt árið, sigur hann.

Jackie Joensen sigur, at hann hevur ikki leigað húsini út til onnur.

– Nei, fyribils er eingin ætlan um skipaða útleigan, leggur hann aftrat.

*vilmund@sosialurin.fo*





**Til teknisku deild okkara verður søkt eftir søluráðgeva, at ráðgeva kundum okkara.**

P/F Maria Poulsen er millum elstu fyritøkum í landinum, og eru vit í dag ein framkomin fyritøka við royndum og heildarloysnum innan hitaverk, vatn, sanitet, ventilatión, kloakk og baðirúmsmøblar.

**Tað setur krøv til okkara starvsfólk**
Tú kemur at ráðgeva kundum okkara og hjálpa teimum at finna tað røttu loysnina. Tú kemur at rokna út tilboð, og verða við til at fyrireika verkætlanir og fylgja teimum í verki. Samstundis fært tú ábyrgd og ávirkan á at menna okkara fyritøku. Tú kemur soleiðis, í samstarvi við onnur, at virka á einum einum spennandi og fjøltáttaðum arbeiðsplássi.

**Vit vænta at tú**
- skilur týdningin av góðum handverki, dygd og góðari kundarøkt
- hevur røttu útbúgving og/ella drúgvar royndir
- hevur royndir innan vhs, ventilation ella líkn.
- dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- er fyrikomandi, nærlagdur, íðin og kreativur

**Afturfyri bjóða vit**
- eitt spennandi starv við nógvum møguleikum
- góðar samstarvsfelagar í góðum fakligum arbeiðsumhvørvi
- ávirkan á tín egna arbeiðsdag

stutt sagt, eitt spennandi starv í einari fyritøku í støðugari menning.

Umsóknir saman við avriti av prógvum og møguligum viðmælum, skal verða innkomin seinast mánadagin 18. apríl 2011 til:

**Maria Poulsen P/F**
Boks 182
Smyrilsvegur 8
FO-110 Tórshavn

Nærri fæst at vita um starvið, við at ringja tel. 312 000 og tosa við Kristian á Dul, stjóra.

**Maria Poulsen**
Tel 312 000 | Fax 315 970 | mp@mp.fo | www.mp.fo